# Viviann rindar fegin



*Verða kodapengarnir umsitnir rætt og fara til tey røttu fólkini, gjaldi eg fegin, tí teir pengarnir fara til eitt gott endamál, sum er at stuðla føroyskum tónleikarum, ið frammanundan hava ring kor í Føroyum, vísir Viviann Slyne á*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hóast fleiri av hennara starvsfeløgum í hárfríðkanaryrkinum eru ørg um kodapengarnar, hevur eigarin av Salong Viviann, Viviann Slyne, ikki stórvegis trupulleikar av kravinum frá Koda. -Verða kodapengarnir umsitnir rætt og fara til tey røttu fólkini, gjaldi eg fegin, tí pengarnir fara til eitt gott endamál, sum er at stuðla føroyskum tónleikarum, sigur Viviann Slyne**

KODAPENGAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Seinasta árið hava fleiri hárfríðkanarstovur í høvuðsstaðnum verið í opnum stríði við felagsskapin Koda, sum umsitir upphavsrættindi hjá tón-listafólki. Koda hevur kravt av hárfríðkanarstovunum, at tær rinda kodapengar fyri at lata viðskiftafólk lurta eftir útvarpinum, meðan tey fáa hárið gjørt. Hetta krav hevur elvt til stóra misnøgd millum hárfríðkanarstovurnar.

Tað eru kortini ikki allar hárfríðkanarstovur í høvuðsstaðnum, sum halda at kravið frá Koda er órímuligt. Ein teirra er Viviann Slyne, sum eigur Salong Viviann. Seinastu fýrá árini hevur hon á hvørjum ári latið Koda 3000 krónur fyri at hava útvarpið standandi frá í salongini.

## Stuðlar tónleikinum

Tað eru eftirhondini nøkur ár síðan, at Koda gjørdi Viviann Slyne greitt, at hon átti at rinda kodapengar fyri at hava útvarpið frá í salongini.

– Av tilvild klipti eg einum advokati um tað mundi, og eg bað tí hann kanna málið fyri meg. Hansara niðurstøða var, at lógin um upphavsrætt fevndi eisini um meg, og tí gjørdi eg av at gjalda alt fyri eitt, greiðir Viviann Slyne frá.

Hóast fleiri av hennara starvsfelagum í hárfríðkanaryrkinum eru ørg um kravið frá Koda, hevur Viviann ikki stórvegis trupulleikar av gjaldinum.

– Í lógini stendur greitt, at vit skulu rinda pengarnar, og tá er lítið at gera. Verða kodapengarnir umsitnir rætt og fara til tey røttu fólkini, gjaldi eg fegin, tí teir pengarnir fara til eitt gott endamál, sum er at stuðla føroyskum tónleikarum, ið frammanundan hava ring kor í Føroyum, vísir Viviann Slyne á.

## Hugna um

Kjarnan í trætuni millum Koda og hárfríðkanarstovurnar í høvuðsstaðnum hevur verið, hvørt hárfríðkanarstovurnar nýta tónleikin í útvarpinum sum undirhald hjá viðskiftafólkunum ella um útvarpið stendur frá sum bakgrundsljóð, sum á flest øllum øðrum arbeiðsplássum í Føroyum.

Viviann Slyne er sannførd um, at tónleikurin, sum antin er at hoyra úr fløguspælaranum ella útvarpinum, fyrst og fremst verður spældur fyri at hugna um í hárfríðkanarstovunum, og tí skal tónleikurin bólkast sum undirhald hjá kundanum.

## Gav skarvin yvir

Í Útvarpi Føroya kom í gjár undan kavi, at Hárfríðkanarfelagið hevur givið skarvin yvir í stríðnum móti Koda.

Seinasta árið hava tríggjar hárfríðkanarstovur í Havn fingið vitjan av umboðsmonnum hjá Koda, sum vildu hava tær at gjalda kodapengar fyri at lata viðskiftafólk lurta eftir Útvarpi Føroya. Allar tríggjar hildu, at kravið var órímuligt, men tvær teirra gjørdu kortini av at rinda pening til Koda.

Tann tríðja, Tóta Sørensen, sum eisini er forkvinna í Hárfríðkanarfelagnum, tvíhelt kortini um, at hon ikki ætlaði at rinda pengingin, sum Koda kravdi. Tóta varð tí stevnd, og hon var til reiðar at fara í rættin fyri at halda upp á sítt. Eftir ætlan skuldi hon í rættin í morgin, men eftir ráðum frá sakførara sínum hevur hon gjørt av skarvin yvir, tí útlitini fyri at vinna sakarmálið vóru lítil og eingi.

# Neyðugt at broyta hugburð



*– Eg kenni tað í ávísum førum so, at føroyskar fyritøkur nassa upp á tónleikarnar. Tað er gamaní hjá fyritøkunum aktivt at nýta tónleik fyri at viðskiftafólkini skulu kenna seg betur, men fyritøkurnar vilja kortini ikki rinda fyri tónleikin, og tað kann ikki vera rætt, sigur Gissur Patursson*

*Mynd: Savnsmynd*

**Ein av »the grand old men« í føroyska tónleikalívinum, Gissur Patursson, heldur at mótstøðan av Koda í Føroyum kemur av vantandi upplýsing og vantandi virðing fyri tónleiki millum føroyskar fyritøkur**

KODAPENGAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Tað hevði ongantíð komið fyri, at ein hárfríðkanarstova ella svimjihøllin høvdu biðið Jóanis Nielsen lisið yrkingar upp, uttan at hann fekk pengar afturfyri.

Gissur Patursson hevur seinastu mongu árini havt fingurin á pulsinum, hvat føroyskum tónleikalívi viðvíkur. Hann er av teirra greiðu áskoðan, at vantandi virðingin hjá føroyskum fyritøkum mótvegis tónleikarum er orsøkin til, at tvídráttur hevur tikið seg upp millum Koda og føroyskan vinnulív.

– Eg kenni tað í ávísum førum so, at føroyskar fyritøkur nassa upp á tónleikarnar. Tað er gamaní hjá fyritøkunum aktivt at nýta tónleik fyri at viðskiftafólkini skulu kenna seg betur, men fyritøkurnar vilja kortini ikki rinda fyri tónleikin, og tað kann ikki vera rætt, sigur Gissur Patursson.

Hann heldur tað er ógvuliga harmiligt, at hugburðurin hjá føroyskum fyritøkum hevur verið, at »kodagjaldið er ein rokning, sum eg vil sleppa undan at gjalda«, sum hann málber seg.

– Hatta er ein ótrúliga keðiligur hugburður. Vilt tú hava tónleik, so mást eisini rinda fyri hann. Í øllum øðrum Norðanlondum er tað ein sjálvfylgja, at fyritøkur, sum spæla tónleik gjalda pengar til koda, men hesin hugburður hevur ikki í nóg stóran mun vunnið frama í Føroyum, vísur Gissur Patursson á.

## Vantandi upplýsing

Gissur Patursson vísir kortini á, at Koda í Føroyum eisini er noytt til at taka í egnan barm, hvat upplýsing viðvíkur. Vantandi upplýsingin er ein orsøk til, at Koda hevur so nógv mótstøðufólk millum føroyskar fyritøkur

– Vit mugu ásanna, at upplýsingin um Koda ikki er á so høgum støði í Føroyum sum aðrastaðni. Vit mangla snøgt sagt upplýsing, tí vantandi upplýsingin hevur við sær, at vanligi brúkarin, sum er vanur við at rinda fyri telefon ella streym, ikki vil rinda fyri tónleikin, sum verður spældur, hóast tað í roynd og veru átti at verið ein útreiðslu á sama stigi sum reingerð, streym og telefon hjá fyritøkunum, sigur Gissur Patursson.

Hann leggur afturat, at hóast langt er á mál er hugburðurin mótvegis Koda batnaður seinnu árini.

– Átøkini í svimjihylinum og hárfríðkanarstovunum er stig rætta vegin. Eg vóni vit koma enn longri í komandi ár, og vónandi verður tað ein sjálvfylgja um nøkur ár, at fyritøkur rinda fyri at spæla tónleik fyri viðskiftafólkunum, greiðir Gissur Patursson frá.